## Beckham er tann lekrasti

Ein atkvøðugreiðsla á heimasíðuni hjá BT letur ongan iva vera um, at David Beckham hevur lekrastu fóbóltsbeinini í HM-kappingini. Í morgun høvdu stívliga 10.000 lesarar greitt atkvøðu, og av hesum átti enski landsliðsskiparin 25%. Cristiano Ranoldo úr Portugal hevði fingið 17% av atkvøðunum, meðan svenski Fredrik Ljunberg átti 15%.

**-mørk**



## Togo-venjarin kúvendi

Satt rok hevur verið um týska Otto Pfister, sum er landsliðsvenjari hjá Togo. Togo er fyri fyrstu ferð partur av HM-endaspælinum, og í farnu viku boðaðu spælararnir frá, at teir vildu hava ein stóran bonus fyri hetta. At spælararnir og stjórnin í landinum áhaldandi keglaðust um hetta, fekk at enda týska venjaran at gevast, tí ehtta vildi hann ikki vera partur av.

Síðani hava bæði spælarar og fótbóltssamband heitt á Pfilster um at koma aftur, og hesum hevur Pfister so játtað.

**-mørk**

# Bygdirnar eru framvegis omaná

**Merkisvert er tað, at tað í tveimum teimum fyrstu FM kappingunum ikki hevur eydnast nakrari manning hjá størsta róðrarfelagnum í landinum at vinna**

FM KAPPRÓÐUR

*Jóannes Hansen*

Hóast sólin og hitin ikki høvdu tann leiklut í miðøkinum leygardagin, sum tað var lagt upp til í veðurforsøgnunum, so gekk tað væl at fáa FM kappróðurin á Kollafirði frá hondini.

Óvanligt fyri gongdina í kappróðrinum nógvu tey seinastu árini var tað, at so nógvar manningar, sum á Norðoyastevnu stóðu ovast á sigursskamlinum, hesa ferð noyddust at víkja plássið fyri øðrum vinnara.

Tað vóru bara tríggjar manningar, sum høvdu vunnið á Norðoyastevnu, og sum aftur vunnu á Kollafirði. Tær vóru í kappingini millum 5-mannafør við kvinnum, har Ørnin aftur hesa ferð sigraði, í kappingini millum 6-mannafør við monnum, har Sølmundur aftur hesa ferð var bestur, og so í kappingini millum 8-mannaførini, har Knørrur aftur hesa ferð var fremstur.

Í mong ár hevur Havnin og høvuðsstaðurin verið nógv tað stinnasta kapp-róðrarøkið. Har býr størsti parturin av unga fólkinum, og har hevur áhugin fyri at rógva kapp verið rættuliga stórur í mong ár.

Havnar Róðrarfelag er størsta felagið av sínum slagi í landinum, og Havnar Róðrarfelag plagar at vinna ofta og nógv. Merkisvert er tað, at tað higartil í ár ikki hevur eydnast manningum hjá Havnar Róðrarfelag at koma fyrstar á mál. Sjey róðrar vóru í Klaksvík, og sjey róðrar vóru á Kollafirði. Havnar Róðrarfelag hevur verið umboðað í tólv av kappingunum – bara í kappingini millum 6-mannafør við kvinnum er felagið ikki við, men í fleiri kappingum er felagið umboðað av fleiri manningum – men tað hevur ikki eydnast at vinna nakað gullmerki.

Í báðum kappingunum, sum higartil hava verið, hava tvær manningar hjá Havnar Róðrarfelag vunnið silvurmerkini. Talan hevur í báðum førum verið um somu manningarnar. Tær hava verið kvinnurnar umborð á 5-mannafarinum Sílinum, og so 8-mannafarið Ørvur. Ein av spennandi spurningunum undan kappingini, sum verður leygardagin á Skálafjørðinum, er, um tað nú fer at eydnast aðrari av hesum manningunum ella kanska onkrari aðrari hjá Havnar Róðrarfelag at vinna. Bæði Sílið og Ørvur vóru ógvuliga nær sigrinum í Kollafirði.

Hóast Havnar Róðrarfelag ikki enn hevur havt eydnuna við sær ella marginalirnar á sínari síðu, sum tað plagar at verða tikið til, so hava aðrar manningar í høvuðsstaðnum gjørt um seg. Men eftir tvær av sjey róðrarstevnum er tað framvegis soleiðis, at bygdafeløgini í tali av sigrum liggja á teimum í høvuðsstaðnum.

Manningar í høvuðsstaðnum hava vunnið fimm róðrar: 8-mannafarið Knørrur hevur vunnið tvær ferðir, Jallur við dreingjum hevur vunnið eina ferð, Lómur við kvinnum hevur vunnið eina ferð, og Blikur við gentumanning hevur vunnið eina ferð.

Róðrarfelagið NSÍ er eitt av teimum stóru, og higartil hava manningar úr hesum felagnum vunnið tríggjar ferðir. Menninir umborð á Sølmundi hava vunnið tvær ferðir, og Eysturoyingur hevur vunnið eina ferð.

Manningar úr Sandavági hava vunnið tvær ferðir. Báðu ferðirnar hava tað verið kvinnurnar umborð á Ørnini. Manningar úr Miðvági hava eisini vunnið tvær ferðir. Fyrru ferðina vóru tað kvinnurnar umborð á Riddaranum, og seinnu ferðina vóru tað genturnar umborð á Frúnni. Norðuri í Sundi hava teir vunnið ein róður – dreingirnir umborð á Rituni – og í Klaksvík hava teir vunnið eina ferð. Tað var tá ið Klaksvíkingur leygardagin kom fyrstur á mál.

# Knørrur lá akkurát á Ørvi



*Talan var um dyst millum havnarbátarnar, og í hesum endaði Knørrur omaná*

*Mynd: Álvur*

**Luttøkan er lítil, men kappingin millum teir báðar fremstu var so mikið tøtt, at FM kappingin tykist vera púra opin**

8-MANNAFØR

*Jóannes Hansen*

Luttøkan í hesi kappingini er so lítil, sum hon ongantíð hevur verið áður. Tað eru bara manningar í høvuðsstaðnum, sum manna hesa bátastøddina. Bygdirnar eru dotnar burtur ímillum. Eitt nú Kvívík, Vík og Klaksvík, sum áður hava verið stinnar í hesi kappingini.

At tað hevði verið spell, um kappingin millum 8-mannaførini datt niður fyri, góvu havnarmenn umborð á Knørri og Ørvi aftur hesa ferð dygga staðfesting av. Argjabáturin fekk góðan start, men tað var skjótt, at tað sást, at aftur hesa ferð fór kappingin at standa millum Knørr og Ørv.

Kappingin var øgilig. Eina løtu í endaspurtinum gekk Ørvur sera væl, og tað kundi sæð út sum um, at Knørrur fór at lúta. Men knarrarmenn funnu síðstu og avgerandi orkuna. Og í síðsta enda vísti tað seg at muna meiri hjá teimum enn hjá teimum umborð á Ørvi.

Munurin var minni enn ein skutur. Í Klaksvík var Knørrur eina bátslongd undan Ørvi. Hetta boðar frá, at tað ivaleyst verður heilt spennandi á Skálafjørðinum nú leygardagin.

**8 mannafør menn**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Knørrur | 07:03.06 |
| 2 | Ørvur | 07:03.21 |
| 3 | Argjabáturin | 07:11.15 |
| 4 | Nevið Reyða | 07:36.06 |

# Sølmundur eigur marginalirnar

**Aftur hesa ferð var munurin millum vinnararnar av Skálafjørðinum og Sundabátin millum lítil og eingin**

6-MANNAFØR MENN

*Jóannes Hansen*



*Hjá 6-mannaførum tykist Sølmunur vera í flokki fyri seg. Og teir umborð eru eisini orsøkin til, at róðrarfelagið í Runavík standa seg væl í samlaðu støðuni*

*Mydn: Álvur*

Tað var rætt og sera intenst, tá ið fremstu bátarnir í størstu kappingini komu skúmandi framvið kaikantinum, har ein rúgva av kappróðraráhugaðu sundafólkunum og tey ikki minni áhugaðu, sum halda við gulu bátunum, koyrdu á sínar menn.

Teir umborð á Sølmundi og Sundabátinum góvu seg fult og heilt. Teir lógu borð um borð, og bara lítil kiksari og lítið mistak kundu kostað sigurin. Tá ið bátarnir fóru um málið, sum í Kollafirði vísir eitt sindur skeivt fyri áskoðarunum. Viðhaldsfólkini hjá Sundabátinum sóu tað soleiðis, at teirra bátur var komin fyrstur á mál. Tað syrgdu tey fyri at geva sínari manning boð um, og ungu menninir sprungu upp í sigursfagnaði fyri síðani at detta niður aftur á árarnar, tá ið tað varð staðfest, at aftur hesa ferð hevur Sølmundur verið tann drúgvasti.

Í Klaksvík lá Sølmundur á Sundabátinum við 5/25 undir sekundi. Hesa ferð var fjarstøðan eitt sindur meiri enn eitt sekund. Sølmundur eigur marginalirnar, og hesa ferð vóru teir eitt vet størri, enn í fyrsta róðrinum.

Í fyrstu kappingini var Jarnbardur minni enn eitt sekund aftanfyri Sundabátin. Hesa ferð var munurin ein bátslongd ella ímillum trý og fýra sekund. Aftur til teir næstu var so mikið langt, at tað illa er hugsandi, at aðrir bátar fara at blanda seg upp í á Skálafjørðinum leygardagin.

**6 mannafør menn**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Sølmundur | 07:11.19 |
| 2 | Sundabáturin | 07:12.22 |
| 3 | Jarnbardur | 07:16.04 |
| 4 | Gongurólvur | 07:19.01 |
| 5 | Smyril | 07:19.03 |
| 6 | Hósvíkingur | 07:20.19 |
| 7 | Lómur | 07:22.10 |
| 8 | Páll Fangi | 07:23.24 |
| 9 | Víkingur | 07:32.01 |
| 10 | Kollfriðingur | 07:40.17 |